## AB'arar til HB

Rógvi Poulsen, sum var ein av ungu argjamonnunum, ið veruliga gjørdi um seg í Formula-deildini í ár. Kviki vongurin, sum enn bert er 18 ár, gjørdi í fleiri dystum veruliga vart við seg, og eftir øllum at døma hevur hetta givið honum mót upp á meira Formula-bólt, hóast AB flutti niður. Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbóltur, váttar, at HB og Rógvi hava skrivað undir trýára sáttmála. Eisini hevur HB gjørt sáttmála við Pætur Jørgensen. Hann hevur sín uppruna í HB, men var seinnu kappingarhálvu í ár partur av AB-liðnum.



## Súni Fríði skal venja B68

B68 hevur gjørt avtalu við gamla málslúkin, Súna Fríða Barbá, sum við hesum verður venjari hjá 1. deildarliðnum hjá B68. Súni Fríði hevur seinastu 15 árini verið millum vandamestu álopsspælararnar í føroyskum fótbólti, men sum skilst er ætlanin nú, at hann bert skal virka sum venjari. Og tí verður hann helst ikki at síggja í álopinum hjá Formulaliðnum hjá B68.



# Jón Rói á veg til Tottenham

**Svenski AaB venjarin heldur at hansara lið hevur ein møguleika, hóast tað kann roknast við, at AaB fer at koma í satt ódnarveður í London hóskvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein føroyskur fótbóltsspælari hevur í hesi vikuni møguleika at vera við í europeiskum fótbóltsdysti. Tað er Jón Rói Jacobsen. Hann telist millum teir átjan AaB spælararnar, sum mikumorgunin fóru úr Aalborg og til London.

Ørindini eru at spæla UEFA Cup uppgerð á White Hart Lane ímóti Tottenham Hotspur FC. Dysturin verður hóskvøldið kl. 20.45.

Lítil ivi man vera um, at svenski AaB venjarin, Erik Hamrén fer at halda seg til teir spælararnar, sum higartil í hesum kappingarárinum hava staðið seg so sera væl. Tað vil við øðrum orðum siga, at Jón Rói Jacobsen verðu ein av eykamonnunum, sum fara at siga á beinkinum og bíða eftir, at tað møguliga skal verða brúk fyri teimum. Súni Olsen hevur ikki fingið boð um at vera við á hesum túrinum.

Hóast tað hevur verið soltið hjá Tottenham higartil í hesum kappingarárinum, so verður bitin hjá AaB ógvuliga stórur. Í Aalborg verður roknað við, at talan verður um eina tí størstu avbjóðingina, sum AaB nakrantíð hevur staðið andlit til andlit við.

AaB venjarin sigur, at hann og spælararnir gleða seg til ógvuliga stóru avbjóðingina.

- Tað verður ógvuliga spennandi at síggja, hvussu vit fara at megna hesa uppgávuna. Avbjóðingin kennist at vera av heilt øðrum slagi enn hinar, sum higartil í heyst hava verið á UEFA Cup skránni. Vit mugu rokna við, at eitt eingilskt lið alla tíðina fer at spæla við øgiligari ferð, og at teir frá fyrsta bríksli fara at leggja stórt trýst á okkum. Um vit yvirhøvur skulu hava nakran sum helst møguleika, so skulu allir ellivu á vøllinum spæla yvir evni alla tíðina, staðfestir Erik Hamrén, og hann heldur fram:

- Vit rokna avgjørt við, at tað skal eydnast hjá okkum, og tá ið tú roknar við, at tað fer at roynast væl, so er talan sjálvsagt um ein møguleika. At tað kann bera til, um tað á pappírinum ikki sær nakað serligt út, hava vit víst fyrr í ár, staðfestir bjartskygdi AaB venjarin, sum er ógvuliga væl sæddur í Aalborg.

# TB tók 6 av 8 gullmerkjum

**Stór flogbóltskapping hevur í vikuskiftinum verið á Tvøroyri, hetta var kapping fyri yngri lið, tað er gentir og dreingir í bólkunum 10, 12 og 14 ár, umframt eisini kvinnu og mansunglingar.**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Fegnar gentur (10 ár), ið vunnu á Tvøroyri*

Kappingin var sera væl fyriskipað, og við Føroya Banka sum stuðli, skipaðu TB fyri einari sera væleydnaðari kapping, ið øll kunnu vera glað fyri.

### Styttri enn vanligt

Kappingin var soleiðis skipað, at hon ikki innibar, teir vanligur reglurnar í flogbólti. Ístaðin fyri at spælt varð til best av fimm settum, varð spælt til best av trimum settum í hvørjum dysti, og hetta stytti munandi um dystirnar. Á hendan hátt var møguleiki fyri at avgreiða so nógvar dystir sum møguligt, og varð kappingin eisini á hendan hátt meiri áskoðaravinarlig.

### Nógvir áskoðarar

Nógv fólk varð komið saman í hallunum báðum, tó serliga inni í Trongisvági, har hølisviðurskiftini eru framúr góð til slík tiltøk. Hetta høvið nýttu nógv fólk og har vóru hjálparfólk í hópatal, umboð fyri kommununa, stuðlar og onnur.

- Samanum tikið er tað stak hugnaligt at fyriskipa eitt slíkt tiltak her suðuri, tí tað eru ein ørgrinna av hjálpandi hondum klárar, alt fyri eitt at hjálpa, bæði í skapi av foreldrum, fyriskiparum, stuðlum, kommunulimum og mongum øðrum. Tá so mong eru til reiðar at taka eitt tak saman, tá gerst tað lætt sum eitt spæl. Og saman við sera góðum hølisviðurskiftum, fer alt upp í eina hægri eind, metir Otto Gram, ein av venjarunum í TB-Flogbólti

### Merkt av frámelding

Fleiri lið, ið høvdu meldað lið til kappingina, komu ikki suður, og millum annað valdi Dráttur at trekkja øll síni lið aftur. Hesi grundgóvu at veðrið fór væntandi at verða ov ringt til at koma suður. Hetta metir ein av fyriskiparunum av kappingini vera sera óheppið, tí ættin er tann besta ættin fyri ferðing um suðuroyarfjørð.

Hetta hevði við sær at kappingin var eitt sindur merkt av umrokeringum og ymsum, ið sovorðnum til hoyrir, men samanumtikið var tað ein sera væl fyriskipað kapping, ið øll, sum møttu upp, munnu vera glað fyri.

### Góð úrslit hjá TB

Í teimum átta kappingargreinunum, kappast varð í, stóðu aloftast eitt lið hjá TB, ovast á heiðursmerkjaskamlunum, og sigur Otto Gram seg vera sera fegnan um hetta. Hann sigur annars at TB tey seinastu mongu árini, nærum altíð hevur havt sterka umboðan á kvinnusíðini, men hann sigur seg nú vera sera spentan, at fylgja dreingjaliðum felagsins, tí har er nógv í væntu hjá hesum dugnaligu unglingum.

Serliga fegin er hann um silvurheiðursmerkini hjá mansunglingum og gullmerkini hjá kvinnuunglingum, tí hiðani verður framtíðin bygd. Tað vera hesi, ið fara at ímynda framtíðar flogbóltin á Tvøroyri og í Føroyum.

### Eftirmeting

Otto Gram sigur seg vera ovurhonds fegnan yvir at tað gekk so væl í vikuskiftinum.

- Fyri fyrstu ferð nakrantíð hava vit í TB- flogbólti fingið teldubrøv, har ymisk lið hava takkað fyri góða kapping og góð upplivilsir. Millum annað varð skrivað, at børnini vóru glað og stolt av at hava verið við á Tvøroyri, sigur Otto, og leggur afturat, at hann er sera spentur um FM-finalurnar, í yngru deildunum, ið verða spældar á Tvøroyri, 22. mars í komandi ári.

- Hesar finalur koma at verða spældar í optimalum umstøðum á Tvøroyri, og vit gleða okkum til at taka ímóti finalistunum og vónandi mongu áskoðarum teirra, sigur hann

FM-finalistarnar hjá gentum og dreingjum í bólkinum 14 ár, umframt kvinnu og mansunglingar, skulu fyri fyrstu ferð spæla finalur á sama gólvi, ið nýtt verður til árligu flogbóltsfinalurnar í februar, hjá teimum vaksnu, og hetta fer at ganga fyri seg á Tvøroyri tann 22. mars.

Hesir finalistar verða allir funnir, tá liðini bresta saman í FM-kapping fyri yngru deildir, tann 1. mars.

### FAKTA

**Úrslitini frá Føroya Banka kappingini á Tvøroyri**

| | Nr. 1 | Nr. 2 | Nr. 3 |
|---|---|---|---|
| Gentur 10 ár: | TB a | KÍF a | KÍF b |
| Gentur 12 ár: | TB a | TB b | KÍF a |
| Gentur 14 ár: | Fleyr a | TB a | KÍF a |
| Kvinnuungl.: | TB | SÍ | KÍF |
| Dreingir 10 ár: | TB a | TB b | TB c |
| Dreingir 12 ár: | TB | SÍ | |
| Dreingir 14 ár: | TB b | TB a | |
| Mansungl.: | SÍ | TB a | TB b |